# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus, okkara tryggleiki. Kl. 11 Gudstænasta, Thorbjørn Brochs.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadagin kl. 18 Tamburinvenjing.
Leygardagin kl. 10-14 hava skótarnir loppumarknað til inntøku fyri »Skótahjálpina«.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 smáskótamøti og stórir skótar kl. 19.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
12. september kl. 20 Ungdómsmøti v/ Holgar Johannesen, kl. 21 Opið hús.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Fríggjakvøldið kl. 20 verður JC Teens – fyri ungfólk til og við 18 ár.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli, Fríðtór Debes talar um endatíðina. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, kl. 21 Útimøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis er barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli og samstundis er møti har Olaf Olsen talar.
www.hebron.fo

**Mariasystir Josuana úr Noregi**
hevur um Gud vil hesi møti: leygardagin 13.9. kl. 20 í KFUK í Havn: Møti, ung syngja.
Sunnudagin 14.9. **Vestmanna missiónshús** kl. 19.

**Aglow, Tórshavn**
Temadagur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygardagin 20. sept. kl. 10 til 15.30. Evni: Hin særda familjan. Alkoholtrupulleikar, manglandi sjálvsvirði hjá kvinnuni/barninum. Hvussu koma vit víðari? Kostnaður 120,- kr., døgurði á Sjómansheiminum íroknaður. Tilmelding á tlf. 313413 í seinasta lagi mikudagin 17. sept. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Bjarni Jøkladal um evnið: "Hvat er bøn og hví skal eg biðja?" og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: - "Endamál samkomunnar - Læran". Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum bæði møtini.
Úti á Fløtum: Mánakvøldið kl. 20: Alfa - Beta skeiðið og týskvøldið kl. 20 verður undirvíst í Opinberingini við Jógvan Z.
Heimasíðan:www.livdin.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Í kvøld kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Jóna Johannesen, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið bønarmøti kl. 20.30.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardagin kl. 18.30: Messa í Mariukirkjuni.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ biskupi Hans Martensen í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Meinigheitshúsið, Tórshavn**
Leygardagin kl. 19.30–22.00: Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Ámundi Berthelsen.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Vestmanna missiónshús**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við mariusystrini Joshuanu frá Evangel. Mariusysturfelagsskapinum í Darmstadt í Týsklandi.

**Saron, Vestmanna**
Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Torstein Johannesen. Innsavnan til Heimamissiónina. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið Tabor á Toftum**
Sunnukvøldið kl. 18.00 verður møti, har Lone Hertz tosar um missión og um ferð sína í Cambodja. Innsavning til neyðstødd børn í Cambodja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jacobsen. Ungdómsmøti verður mánakvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Bygdarhúsið í Tjørnuvík**
Felagsmøti verður leygarkvøldið kl. 20 við luttøku úr Skopun. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Fríggjakvøldið: Opið hús kl. 21.00 v/ Símin Absalonsen. Sunnudagin: Møti kl. 17.00 v/ Martin Olsen. Barnamøti kl. 17.00.
Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti. Sang og vitnimøti.
Barnaansing verður. Kl. 21 Ungdómsmøti v/ Sylverius Jacobsen.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti við Elisabeth Vingborg, lmf. Innsavnan, kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Árliga LMF-stevnan**
verður í KFUM og K í Klaksvík 12. og 13. sept. Elisabeth Vingborg sigur frá 40 ár sum trúboðari í Nigeria. Fríggjakvøðið 12. sept. kl. 20 fundur við Elisabeth Vingborg: Mit liv som missionær i Nigeria.
Leygardagin kl. 10 Bíbliufundur við Anne-Lene Olofson: Jødedommen på Jesu tid, kl. 14 Fundur við Elisabeth Vingborg: Den Lutherske kirke i Nigeria, kl. 16 Bíbliur til Kina: Ung í KFUM og K siga frá. Innsavnan til LMF. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti v/ Hjalgrím Davidsen. Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

**Getsemane**
*á Brekku 19, Klaksvík*
Mikukvøldi kl.20.00 er bønarmøti
Fríggjakvøldi kl.20.00 er hugnaløta fyri ung
Sunnukvøldi kl.18.00 er møti (filmur um Thominu Svødstein verdur vístur).
Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 Barnaarbeiðið 1.-5. fl.
Týskvøldið kl. 19 Tey ungu 6 fl. og eldri. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skálavík**
Møti verður sunnudagin kl. 18 har Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari talar. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti við Ragnar Ludvig verður fríggjakvøldið kl. 21.30.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Jeannu Viderø. Mourits Viderø syngur. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Hvalba**
Allir sjómanskvinnuringarnir í oynni samlast í missiónshúsinum í Hvalba leygardagin 27. sept. kl. 18.00. Sjómanstrúboðarin verður við. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Hóskvøldið 18. sept. kl. 19 Barnagudstænasta í Hvalbiar kirkju v/ Bergi D. Joensen, kl. 20.30 Ungdómsmøti í missiónshúsinum. Drekkamuður.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Leygarkvøldið kl. 20 Bøn- og lovsongsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Ragnar Ludvig talar.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur, Robert Mc-Luckie talar, kl. 21 Útifundur um viðrar.
Mánadagin kl. 20 Uppbyggingarfundur, Robert McLuckie talar.
Ónsdagin kl. 20 Bønarfundur.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøld Bønarmøti kl. 21 og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Kaffi er at fáa báðar dagarnar.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Týsdagin 9. september*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 14.30 Havnaprát
*Mikudagin 10. september*
kl. 9.30 Túrur til Nólsoyar, farið verður kl. 9.30 við Rituni og heim aftur kl. 16.30. Vitja verður á bygdasavninum, døgurði og síðani verður vitja í Korndali, har Richard Jacobsen sigur frá.
**Tilhaldið stongt í dag. Tilml. 316491, gjaldast áðrenn 150,-**
*Hósdagin 11. september*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 12. september*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 14. sept. verður gongutúrur: Ravnagjógv-Reynsatindur-Vatnsoyrar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.30. Tungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Vága Gongufelag – gongutúrur til Kirkjubøar**
Um viðrar skipar Vága Gongufelag fyri túri úr Havn til Kirkjubøar sunnudagin. Farið verður frá Nomatek kl. 14. Tilmelding á tlf. 333455 ella 353300.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
byrjar aftur týsdagin 16. september kl. 15.00.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**ACA**
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:** Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Ráðgeving um heilaskaðar**
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.



## FILMSTEIGURIN

# Karibisku sjórænararnir

Eitt av stoltu skipunum í bretska flotanum er á veg til hjálondini í Vesturindia. Umborð eru ein høgtstandandi embætismaður og dóttir hansara. Út úr mjørkanum dagar knappliga ein øgiligur vitnisburður um, hvussu vandamikið karibiska havið er: Eitt brennandi skip liggur fyri vág og vind eftir eitt sjórænaraálop. Tann einasti á lívi umborð á skipinum er ein hálvdeyður lítil drongur sum verður tikin umborð á bretska skipið. Um hálsin á dreinginum hongur ein hálsketa við einum deydningahøvdi á. Fyri at drongurin ikki skal verða mettur sum sjórænari, tekur lítla embætismannadóttirin hálsketuna og goymir hana.

Síðan leypir søgan 10 ár fram í tíðina…





# Stóra ævintýrið hjá Purkili

Hóast man er lítil kann man gera góðan mun!

Purkil ger ikki nógv burturúr sær sjálvum, men hann hevur kortini ein stóran leiklut í øllum teimum ævintýrum, sum Palli Pumm og vinir hansara uppliva. Men tað finna Palli Pumm og vinirnir ikki útav, fyrr enn Purkil knappliga er burtur. Palli Pumm og vinirnir fara at leita eftir Purkili og finna eina skrivibók, har Purkil hevur skrivað sínar endurminningar. Um bókin inniheldur endurminningar, má hon eisini kunna minnast hvar Purkil er, heldur Palli Pumm. Palli Pumm, Asnar, Tikarin og Kaninus fara tí undir at minnast aftur á sínar upplivingar og harvið fylgja slóðini eftir Purkili, ið vísir seg at vera ein stór hetja.





**Frumsýning**
Fríggjadagin 12.09. kl. 20$^{30}$ — Fríggjadagin 12.09. kl. 23$^{30}$
Leygardagin 13.09. kl. 20$^{30}$ — Leygardagin 13.09. kl. 23$^{30}$
Sunnudagin 14.09. kl. 19$^{45}$ — Sunnudagin 14.09. kl. 22$^{45}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




**Frumsýning – Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 12.09. kl. 16$^{45}$ — Fríggjadagin 12.09. kl. 19$^{00}$
Leygardagin 13.09. kl. 16$^{45}$ — Leygardagin 13.09. kl. 19$^{00}$
Sunnudagin 14.09. kl. 16$^{00}$ — Sunnudagin 14.09. kl. 18$^{30}$




Fríggjadagin 12.09. kl. 17$^{00}$ — Leygardagin 13.09. kl. 17$^{00}$
Sunnudagin 14.09. kl. 16$^{30}$




**Billettprísur: 45,- kr.**
Fríggjadagin 12.09. kl. 18$^{30}$ — Leygardagin 13.09. kl. 18$^{30}$
Sunnudagin 14.09. kl. 17$^{45}$




Fríggjadagin 12.09. kl. 20$^{45}$ — Leygardagin 13.09. kl. 20$^{45}$
Sunnudagin 14.09. kl. 20$^{15}$




Fríggjadagin 12.09. kl. 23$^{00}$ — Leygardagin 13.09. kl. 23$^{00}$
Sunnudagin 14.09. kl. 22$^{30}$